

# Vilt tú tryggja okkara KT?

sansir.fo

**Trygg og framkomin kunningartøkni, umframt framsøkni og nýhugsan innan KT, eru týðandi liðir í at menna okkara felag og samtak. Fyri at styrkja og menna okkum á hesum økjum, leita vit nú eftir rætta KT fólkinum. Kanska hetta er tú?**

## Vit kundu hugsað okkum, at tú

> hevur viðkomandi útbúgving og/ella royndir og hug at arbeiða innan KT-økið
> ert tænastusinnað/-ur, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
> dugir væl at raðfesta, at halda ásettar freistir og ert framsøkin
> dugir væl at arbeiði sjálvstøðugt og í toymum
> ert jalig/ur og sært tað skilagóða í broytingum
> dugir at samskifta á enskum
> hevur vitan/royndir innan fleiri av teimum tøknum, ið vit nýta: Microsoft servara skipanir. Herundir Windows Server og Active Directory, Exchange Server, IIS, SharePoint, SQL Server, ISA Server, VMware ESX, EMC storage, Cisco, Symantec

## Vit kunnu bjóða tær

Fjølbroytt og avbjóðandi starv í eini spennandi fyritøku, sum er í stórari menning.
Eitt starv í eini fyritøku við greiðum málum, góðum arbeiðsumstøðum og virkisfúsum starvsfólkum, ið grunda sítt virksemi á virðini - vilja til lønandi vøkstur, virðing fyri heildini, ágrýtni og nærlagni, langtíðarhugsjón og broytingarsinni.
Stórur dentur verður lagdur á starvsfólkatrivna og førleikamenning.

## Arbeiðsøki

Tú kemur – sum KT-fólk – at starvast á deildini fyri Menning & Marknaðarføring (M&M).
Deildin er býtt í trý øki. Hesi eru Menning, Marknaðarføring og KT. Tú kemur at starvast í økinum fyri KT, ið hevur ábyrgd av KT-umsiting, -trygd og -menning hjá samtakinum.
Á M&M deildini starvast í løtuni 13 starvsfólk. Deildin veitir tænastur til Tryggingarfelagið Føroyar umframt til onnur feløg í samtakinum, herundir TF Holding og Betri pensjón.

## Lønar-og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum, og verður lønt í mun til útbúgving og royndir.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Kristinu Háfoss, deildarstjóra, á tel 34 56 00 ella við at senda teldupost til kh@trygging.fo.

Umsóknarfreistin er 17. mars 2009 kl. 12.00.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella umvegis www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*






Altíð tað nýggjasta

www. sosialurin.fo